# Leggja nógva orku í ráðstevnuna




*Eyðun Elttør, landsstýrismaður við orku- og umhvørvismálum, setti stevnuna við at minna á, at eisini tá vit vaska upp heima, brúka vit nógva orku*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Orku- og umhvørvisráðstevnan, sum Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag skipar fyri, varð sett í Norðurlandahúsinum hósmorgunin. Stevnan er sett at vara í tveir dagar og hevur ein fjølbroytta skrá við fyrilestrahaldarum bæði úr Føroyum og uttaneftir**

RÁÐSTEVNA
*Edvard Joensen*

**Tórshavn:** Umhvørvisráðstevnan varð sett av Eyðuni Elttør, landstýrismanni við orku- umhvørvismálum. Síðan varð farið beinleiðis til fyrirlestrarnar, sum eru nógvir og fjølbroyttir.

Rættiliga passandi fyri eina umhvørvisráðstevnu i Føroyum, nevndi tónleikabólkurin, sum spældi, tá stevnan varð sett, seg Tjaldur. Og aftan á Tjaldrinum kom Eyðun Elttør og setti stevnuna.

Landstýrismaðurin tosaði um orku. Um hvussu nógva orku vit í veruleikanum brúka, uttan at hugsa um tað. Tá vit gera hetta ella hitt. Líkamikið hvat vit taka okkum fyri, brúka vit orku.

Um hvussu vit eiga at hugsa okkum um, tosaði hann, og hugleiddi víða. Já, sjálvt tað hann stóð heima í køkinum og vaskaði upp, vísti hann á, varð eisini brúkt orka.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður vónaði, at orku- og umhvørvisráðstevnan, sum nú var sett, fór at kasta ljós á viðurskifti, sum vit føroyingar eiga at taka upp og kjakast um.

Fyrilestrahaldarar eru komnir uttan úr heimi at greiða frá ymsum verkætlanum og royndum við ymiskum orkukeldum. Tað verið seg vind, ljós ella havstreymar.

Eisini er ein íslendingur, Jón Bjørn Skúlason, komin at greiða frá íslendskari verkætlan við millum annað at reka eitt skip við brintorku.

Av øðrum útlendskum fyrilestrahaldarum kann millum aðrar nevnast fyrrverandi danski umhvørvismálaráðharrin, Sven Auken, sum seinnapartin í dag fer at halda fyrilestur um orku- og umhvørvispolitikk í Danmark.

Eftir at Eyðun Elttør, landsstýrismaður, hevði sett stevnuna í gjár, helt Kári Thomsen, formaður í Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag, fyrilestur, har hann millum annað tók eitt sindur aftur í søgu felagsins.

Hann nevndi millum annað, at felagið varð stovnað á grækarismessu 1980, og nevndi í hesum sambandi stovnaran og eldsálina, Tormóð Dahl.

Eisini kom Kári Thomsen inn á veðurlagsbroytingar, sum verið hava, síðan farið varð undir at máta veðrið. Hann nevndi millum annað, at í bara í «okkara tíð« er hitalagið broytt, soleiðis at tað nu á norðaru hálvu er meira enn hálvt stig heitari, enn tað var fyri góðari øld síðan.

Sum vera man, verður eisini tosað um el-orku á slíkari ráðstevnu, og fara fleiri av útlendsku fyrilestrahaldarunum at gera tað.

Men eisini føroyingar vita eitt sindur um el-orku, og tí greiddi Klæmint Weihe, stjóri í SEV, frá í fyrilestri, hann helt beint eftir, at Kári Thomsen hevði hildið sín fyrilestur.

Seinni út á dagin skuldu millum aðrar Knud Simonsen, havfrøðingur, og Signar Heinesen, verkfrøðingur, halda fyrilestrar um ávikavist veðurlagsbroytingar og um vindmátingar, sum gjørdar eru.

Fyrilestrarnir, sum hildnir fara at verða um miðja stevnuna, vera í stóran mun rímiliga tekniskir. Talan verður um fakfólk, sum fara at greiða frá verkætlanum og royndum, tey hava gjørt í ymsum londum.

Móti endanum av stevnuni, seinnapartin í dag, fer Håvard Turesen úr Noreg at halda fyrilestur, sum hann nevnir Norðurlendskt umhvørvisarbeiði.

Síðan kemur Sven Auken við sínum fyrilestri um danskan umhvørvispolitikk, og at enda á skránni, klokkan 16.00 í dag, fer Katrin Dahl Jacobsen, løgtingslimur, at halda fyrilestur, sum hon nevnir: Skrá fyri framtíðar orku- og umhvørvispolitikk.



*Tónleikabólkurin Tjaldur spældi, tá Orku- og umhvørvisráðstevnan varð sett í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




*SEV stjórin veit eisini okkurt at siga um orkunýtslu í Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



Besta samgonguboð hjá fyrrv. løgmanni og formanni Sambandsfloksins:

# ABC ella BCDH

*Edmund Joensen fekk dygga álitisváttan frá veljarunum í Eysturoynni. Her er hann saman við einum av sínum dyggu stuðlum, konuni Edfríð uttan fyri heimið á Oyrabakka*

*Mynd Jan*



**– Tað vil vera at ganga ímóti fólkaviljanum, um flokkar, sum ganga inn fyri ríkisfelagsskapinum, ikki koma at vera við til at mynda komandi samgongu, sigur Edmund Joensen, sum fekk eitt rimmar val í Eysturoynni**

VAL OG SAMGONGUMØGULEIKAR
*Jan Müller*

Tað var ein ovurfegin Edmund Joensen, fyrrverandi formaður Sambandsfloksins og fyrrverandi løgmaður, sum fylgdi valúrslitinum týskvøldið, tí tá avtornaði fekk hann eina dygga álitisváttan frá veljarunum og varð afturvaldur við einum tí besta úrslitinum hann hevur havt øll árini í politikki við undantaki av valinum í 1990, har hann setti met sum umdømisvaldur í Eysturoynni við 501 atkvøðum. Hesaferð fekk hann 430 atkvøður, og tað heldur Edmund Joensen sjálvur er eitt frálíkt úrslit, tá hugsað verður um, hvussu sterk uppstillingin varð í oynni og hvussu lítil lokali skansin á Oyrabakki er. Edmund kom á ting í 1988 og hevur sostatt verið tingmaður í 14 ár. Hann hevur eisini røkt formanssessin hjá flokkinum, hevur verið løgmaður og sitið á fólkatingi. Í dag er hann formaður í tingbólkinum.

Edmund Joensen er sera fegin um úrslitið hjá Sambandinum, men verri var, at tað »skrekkscenario« hann hevði ímyndað sær undan valinum, gjørdist veruleiki: nevniliga at tað kom at standa á jøvnum, og teir smáu flokkarnir gjørdust tungan á vágskálini. Hann heldur, at løgtingið, áðrenn tað fór til hús, átti at sett landsstýrinum eitt misálit fyri at sleppa undan at koma í hesa støðuna. Undirtøka varð tó ikki fyri tí. Varð hetta gjørt, so varð eingin í landsstýrinum í løtuni.

## Leggja frá sær

Edmund Joensen heldur, at samgongan eigur at leggja frá sær og roynt eigur so at verða at finna ein nýggjan meiriluta. Møguleikarnir eru nógvir viðgongur hann. Uppá fyrispurning um tað ikki er vandi fyri, at Sambandsflokkurin hóast hann gjørdist vinnari á valinum kemur at verða settur uttan fyri eina samgongu, sigur Edmund Joensen, at tað vil hann sanniliga ikki vóna. Tað vil so verða móti fólkaviljanum. Tað eru tey ríkisfelagsskapssinnaðu, sum hava vunnið valið. Og út frá tí skal Sambandsflokkurin í eina samgongu.

Fyrrverandi formaður Sambandsfloksins heldur tað eisini verða sera áhugavert at merkja sær, at tað var meira hóvligi sjálvstýrisvongurin – ella sum onkur hevur kallað hann, sambandsvongurin, í Fólkaflokkinum, sum vann valið í størsta valdøminum, og tað heldur hann vera eitt áhugavert signal til leiðsluna í Fólkaflokkinum. Sjálvur heldur hann, at vit finna sama tendens í Javnaðarflokkinum og vísir til nýggja tingmann floksins í Sandoynni. Hann heldur sum heild, at tað var meira sambandssinnaði vongurin í Javnaðarflokkinum, sum kom best frá valinum eisini. Út frá hesum sannroyndum heldur Edmund Joensen, at tað átti at verið ein stórur meiriluti millum stóru flokkarnar, Sambandsflokkin, Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin fyri eini samgongu millum teir.

## Fýra flokkar

Men Edmund Joensen vil kortini ikki útiloka nakrar møguleikar. Hann heldur tað eisini vera ein góðan møguleika við eini samgongu millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Miðflokkin, tvs. eina B,C,D,H samgongu. – Tað vil kanska altíð vera ein viðbrekin samgonga við báðum teimum smáu, men hinvegin, tá tú hevur gjørt eina við 17 tingmonnum og ein leypir frá, so fæst hon ikki frá aftur, uttan at tú hevur 17 ímóti. Tvs. at ein fær ikki spælt hund við hinum. Soleiðis kann man siga, at hon er minni viðbrekin enn ein líknandi fyrr við 17 tingmonnum.

Samanumtikið heldur Edmund Joensen, at valið er ein sigur fyri tey, sum velja ríkisfelagsskapin, og leggur hann serstakan dent á, at hetta er eisini ein ósigur fyri víðgongdu kreftirnar í Fólkaflokkinum.



*Ein fegin Edmund Joensen, sum heldur tað vera at ganga móti fólkaviljanum, um flokkar, ið ganga inn fyri ríkisfelagsskapinum ikki koma í samgongu*

*Mynd Jan*